## Fletcher upp í løn

Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, staðfestir nú, at miðvallarin, Darren Fletcher, telist millum stuðulsspælararnar í felagnum, og at hann tí skal hava ein nýggjan og betri sáttmála, hóast tvey ár eru eftir av núverandi sáttmála. Í summar skulu partarnir samráðast, og roknað verður við, at Fletcher fær ein avtalu, sum gevur honum eina vikuløn upp á einar 750.000 krónur. Darren Fletcher er – eins og United-venjarin – ættaður úr Skotlandi.



## Skulu steðga Rooney

Í vikuni skulu Manchester United og Bayern München spæla fjórðingsfinalu í Champions League, og sálarliga kríggið er langt síðani byrjað. Bayern-spælarin, Arjen Robben, heldur United leggja ov nógva ábyrgd á ein spælara, Wayne Rooney. – Tað ber væl til at vinna á United. Teir eru mestsum ein einmansherur, og okkara verjuspælarar fara at leggja nógva orku í at steðga Wayne Rooney, sigur Robben.



Regin M. Petersen og hinir í Kyndli vunnu storsigur á strandingum, og tá VÍF samstundis tapti, kom Kyndil í FM-finalurnar ímóti Neistanum

Mynd: Álvur Haraldsen

### Kyndil-StÍF 26-15 (11-7):

# Teir grønu duga at toppa

**Kyndil hevur gjørt tað so oftani fyrr. Sligið til, júst tá tað er neyðugt. Og tað dugdu teir aftur sunnudagin, tá krútsterka verjan var lykilin, sum knústi finaludreymin hjá StÍF**




Jákup Mørk

Tað var annars ikki nakar stórsigur, sum lá í luftini fyrsta partin av dystinum. Hóast tað gekk javnt á fyrsta korterið, so tóktust gestirnir at vera omaná, og í øllum førum komu skoringarnar frá teimum nógv meira ómaksleyst enn hjá Kyndli, sum mátti nýta nógv meira orku til síni mál.

Og tað var fyrst og fremst Erlendur Johannesen í Kyndil-málinum, sum var høvuðsorsøkin til, at Kyndil hekk somikið væl í gestunum. Einar trígjar ferðir var talan veruliga um klassabjargingar frá veteraninum, sum í ár hevur funnið sín næsta ungdóm.

Seinastu 10 minuttirnar undan steðginum byrjaði Kyndil tó spakuliga at prógva, at liðið hevur eina verju, sum á góðum døgum kann vinna ein hondbóltsdyst. StÍF fekk bara eitt mál hesa løtuna, og tó at talan ikki var um málveitslu hjá Kyndli, so tóku teir seg alt longur burtur.

### Áskoðarar í gongini

Kanska vóru tað boðini um, at Neistin var á odda í Vestmanna, sum festu í Kyndilin. Í øllum førum var talan veruliga um klassamun eftir steðgin. Preda, Marius og Leivur sluppu at kalla als ikki til skot longur, og stútt og støðugt byrjaði dysturin at líkjast einum veruligum avsmurningi.

Soleiðis var tað als ikki sjálvur dysturin, ið var tað, sum upptók áskoðararnar mest seinasta korterið. Fleiri av teimum, sum vóru í høllini, gingu ístaðin kyk út í gongina, har tað umvegis hátalararnar bar til at fylgja við dystargongdini í Vestmanna.

Eitt skifti hevði lagið hug at dala, men tá Neistamálini aftur øktust móti dystarenda, gjørdist rómurin á grønu áskoðarunum øgiligur. Og sum onkur teirra tók til, so var tað ikki á hvørjum degi, at tey somikið íðin stuðlaðu Neistanum.

Og so gekk alt upp í eina hægri eind hjá Kyndli. Ikki endilga tí teir hava verið mest støðuga liðið. Tí tað kann neyvan sigast um nakað av liðunum frá nummar tvey til seks. Heldur er tað eginleikin at reisast, júst tá tørvurin er størstur. Og dirvi at taka av, tá møguleikin býðst. Tað er kynstrið, sum teir í Kyndli duga betur enn teir flestu, og tað var eisini kynstrið, sum sunnudagin borgaði fyri, at talan verður um grannauppgerð, tá FM-finalurnar verða á skránni um páskirnar.

## Visti tað altíð

**Smílini vóru stór hjá Kyndils-spælarunum, tá teir kundu staðfesta, at finaluplássið var heima**

– Passar tað? Vann Neistin?

Áðrenn nøkur samrøða við útsenda blaðmannin kundi gerast, mátti Janus Einar Sørensen vita, hvussu leikur fór í Vestmanna, og tá vissa var fingin fyri, at pláss í FM-finaluni var heima, varð eitt brøl geylað til áskoðararnar.

Og hóast møðin var stór og sveittadroparnir nógvir, tá Janus Einar skuldi taka samanum fyrstu 20 dystirnar, so var vanliga speisemi alt fyri eitt til staðar.

– Eg visti tað altíð, at vit fóru at koma í finaluna. Sjálvandi skuldu vit tað, flenti hann, áðrenn hann aftur var meira álvarsamur.

– Hetta hevur verið eitt ótrúliga løgið ár. Vit hava spælt illa til tíðir og væl til aðrar tíðir. Móti StÍF hava vit til dømis fingið bank fleiri ferðir, men í dag riggaði tað hjá okkum. Vit vistu, at vit máttu ikki kiksa í dag, og tíbetur riggaði tað.

Undan dystinum vistu tit, at tykkara støða eisini var tengd at úrslitunum í øðrum dystum. Ávirkaði hetta tykkum, tá tit fóru á vøllin?

– Tað haldi eg ikki. Sjálvandi hugsar tú um tað, men okkara partur kundi bara gerast her. Vit máttu loysa okkara uppgávu, og tað gjørdu vit tíbetur. Ikki minst í verjuni.

Og er tann verjan eisini nóg góð til at tryggja tykkum ein sigur í tveimum og kanska trimum finalum móti Neistanum?

– Tað skal hon vera. Vit fara í øllum førum út á vøllin fyri at vinna hasar finalurnar, staðfesti Janus Einar Sørensen.

-mørk

## Bestir innanhýsis

Tað var reglan um, at innanhýsis dystir viga tyngri enn málmunurin, ið gjørdi, at Kyndil vann sær sæti í FM-finaluni.

Nú tey 20 umførini í landskappingini eru farin aftur um bak, hava bæði Kyndil og KÍF 18 stig. Kollfirðingar hava enntá betri málmun, men Kyndil hevur vunnið trígjar av teimum fýra innanhýsis uppgerðunum, og tí eru teir nummar tvey á talvuni.

Hjá Kyndli var støðan tann undan dystinum, at gjørdust innanhýsis dystirnir avgerandi, so høvdu teir fyrimunin móti bæði KÍF og VÍF, og tí ráddi einamest um at fylgja við, hvussu leikur fór í Vestmanna. Har vildi enntá ein javnleikur verið nóg mikið hjá Kyndli, so fagnaðurin var meira enn bara vanliga stórur, tá David Edvardsen við brotskasti skoraði til 29-26. Tá var bara góður minuttur eftir at spæla, og so kundu Kyndils-áskoðararnir draga andan lættari og klappa sínum monnum gjøgnum seinasta minuttin av dystinum í Havn.

-mørk